## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin okkurt ælið, partvís vátakavi, men seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týssdagin upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís heglingur, men mikudagin lækkar hann niður í útsynning, minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Føroyskir tónleikarar í strikum

**Leygardagin 2.mai kl.16.00 letur upp framsýning við Pernille Mejslov við tekningum av føroyskum tónleikarum**

FRAMSÝNING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eftir tríggjar ferðir í Føroyum og túsundvís av strikum sýnir danska Pernille Mejslov nú 50 tekningar fram í Norðurlandahúsinum av føroyskum tónleikarum.

Á framsýningini "Tónleikatekningar úr Føroyum" spæla føroyskir tónleikarar ein heldur øðrvísi leiklut sum listarlig myndevni. Í smáum bólkum heima í stovuni, til alt symfoniorkestrið undir venjing til jólakonsertirnar ella til The Wall hevur listakvinnan á sín egna hátt endurskapa tónleikin í sínum tekningum. Ella sum ein ummælari tók til: Á framsýningini fara vit at hoyra tekningarnar hjá Pernille Mejslov ...

Sjálv sigur listakvinnan, at hon leggur seg eftir at síggja, ikki at hugsa.

- Eg hugsi best, tá myndevnið rørir seg. Sum teknari royni eg at binda okkum saman og geva tí, sum eygað sær, eina striku og eitt skap, sum sameinir okkum, eftir at tónleikurin er tagnaður, sigur listakvinnan.

Framsýningin "Tónleikatekningar úr Føroyum" verður at síggja fram til 24. mai



*Føroyskir tónleikarar eru myndevni á tekningunum hjá Pernille Mejslov, sum nú verða at síggja í Norðurlandahúsinum*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 10 |
| Madrid | -- |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 34 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 969 hPa. í útsynning sunnan úr Íslandi fer í landnyrðing og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í dag.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið við Føroyar hvørvur norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/04 kl. 06⁰⁰ – 29/04 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 28/04 kl. 06⁰⁰ – 29/04 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 106 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

28.apríl Mánin næstur jørðini
1.mai Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. mai | 00:21 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:21 | 15:01 | 03:21 | 16:01 | 11:16 | 23:56 | 10:16 | 22:56 | 00:36 | 13:16 | 01:36 | 14:16 | 00:06 | 12:46 | 01:21 | 14:01 |
| 2. mai | 01:41 | 14:19 | 00:41 | 13:19 | 00:56 | 13:34 | 03:41 | 16:19 | 04:41 | 17:19 | - | 12:34 | 11:34 | - | 01:56 | 14:34 | 02:56 | 15:34 | 01:26 | 14:04 | 02:41 | 15:19 |
| 3. mai | 02:58 | 15:20 | 01:58 | 14:20 | 02:13 | 14:35 | 04:58 | 17:20 | 05:58 | 18:20 | 01:13 | 13:35 | 00:13 | 12:35 | 03:13 | 15:35 | 04:13 | 16:35 | 02:43 | 15:05 | 03:58 | 16:20 |
| 4. mai | 03:43 | 16:05 | 02:43 | 15:05 | 02:58 | 15:20 | 05:43 | 18:05 | 06:43 | 19:05 | 01:58 | 14:20 | 00:58 | 13:20 | 03:58 | 16:20 | 04:58 | 17:20 | 03:28 | 15:50 | 04:43 | 17:05 |
| 5. mai | 04:27 | 16:49 | 03:27 | 15:49 | 03:42 | 16:04 | 06:27 | 18:49 | 07:27 | 19:49 | 02:42 | 15:04 | 01:42 | 14:04 | 04:42 | 17:04 | 05:42 | 18:04 | 04:12 | 16:34 | 05:27 | 17:49 |



Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum

javni

– Virkin og virðismikil

www.javni.fo